


## Kommunal dagrøkt 25 ár á baki

*Hin 1. desember í ár eru liðin 25 ár, síðan dagrøktin í Miðvági gjørdist kommunal. Miðvágs kommuna ætlar ikki, at tað skal fara aftur við borðinum.*

**Fara tit at hátíðarhalda hetta?**
- Ja, tað fara vit við almennari samkomu í auluni í bygdarskúlanum komandi fríggjadag, sum er hin 3. december.

Kommunan sigur, at hátíðarhaldið verður frá klokkan 16-18 hendan dagin.

Barnaansingin í Miðvági er broytt munandi, síðan byrjað varð við dagrøktini, men framvegis eru børn í dagrøkt, hóast bæði barnagarðar og frítíðarskúli eisini eru. Miðvágs kommuna veit at siga, at um ikki so langa tíð fara øll børnini, sum í dag eru í dagrøkt, at sleppa í nýggja stovnin á Stórutrøð.

Dagrøktarleiðari í Miðvági er Majbritt Poulsen. Hon sigur, at dagrøktin verður niðurløgd, og børnini í dagrøktini fara í vøggustovu, tá nýggi stovnurin á Stórutrøð er liðugur.

Børnini, sum ganga í dagrøkt, eru í aldrinum 0-3 ár, og hesi eru 23 í tali.

**Hvar eru børnini í dagrøkt?**
- Dagrøktarbørnini eru í røkt ymsastaðni í bygdini, men hittast tó í spælistovuni, sum er í gamla Salem. Her eru tey tveir dagar um vikuna, sigur dagrøktarleiðarin.

Majbritt Poulsen leggur aftrat, at øll børnini tó ikki eru í spælistovuni samstundis, men at hvør dagrøktarmamma er við sínum børnum minst einaferð um vikuna.

# Sluppu við skrekkinum

**FERÐSLUÓHAPP** Tað sá ógvusligt út, tá ein bilur seinnapartin leygardagin fór út av vegnum sunnan fyri Hvalvík

Eirikur Lindensko

Fimm sjúkrabilar vóru á staðnum, men tíbetur vóru avleiðingarnar ikki so álvarsamar, tá ein bilur við fimm fólkum, tveimum vaksnum og trimum børnum, fór út av vegnum sunnan fyri Hvalvík - oman fyri bygningin hjá Norðsetur.

Førarin misti tamarhaldið á bilinum í hálkuni, og bilurin fór niðan av vegnum. Boð vóru send eftir fimm sjúkrabilum, og fólkini vórðu flutt á Landssjúkrahúsið.

- Men tey sluppu við skrekkinum, sigur vakthavandi á politistøðini í Havn.

Øll vórðu útskrivað aftur av sjúkrahúsinum beinanvegin.

*eirikur@sosialurin.fo*


Mynd: Álvur Haraldsen


Mynd: Birgir Waag Høgnesen

***Hóast tað sá ógvusligt út, so sluppu øll fimm fólkini í bilinum við skrekkinum***

## Í MORGIN




Fleyr til gul av ymsum ættum, um kvøldið lot av útsynningi. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 1 og 4 stig.

## MIKUDAGIN




Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi, seinnapartin upp í hvassan vind . Regn av og á og hitin millum 2 og 5 stig.

## HÓSDAGIN




Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og rregn av og á. Hitin millum 4 og 7 stig.

**Veðrið fríggjadagin og leygardagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av norði og kavælingur, men onkur sólglotti. Hitin millum 0 og +4 stig

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Ein hátrýstryggur, meira einn 1032 hPa. norðan fyri Føroyar verður yvir Føroyum týsdagin.




**Komandi nátt:**
Hátrýstryggurin við Føroyar fer í landsynning og brúgvaløgini við Ísland koma hendavegin.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 127 mm



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Nuuk | 5 | Tromsø | 6 | Moskva | 16 | Athen | 26 |
| Reykjavík | 11 | Bergen | 12 | Berlin | 25 | Beijing | 30 |
| Tórshavn | 10 | Oslo | 22 | Paris | 20 | New Dehli | 30 |
| Lerwick | 9 | Stokkhólm | 20 | Madrid | 28 | Bangkok | 34 |
| Aberdeen | 12 | Keypmannah. | 19 | Róm | 26 | Sydney | 14 |
| London | 19 | Helsinki | 16 | Malorca | 26 | New York | 33 |

## VESTFALLSKYRRINDI

28. nov Seinna kvarter
30. nov Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 29. nov | 00:31 | 13:08 | - | 12:08 | - | 12:23 | 02:31 | 15:08 | 03:31 | 16:08 | 11:23 | 23:45 | 10:23 | 22:45 | 00:46 | 13:23 | 01:46 | 14:23 | 00:16 | 12:53 | 01:31 | 14:08 |
| 30. nov | 01:30 | 13:52 | 00:30 | 12:52 | 00:45 | 13:07 | 03:30 | 15:52 | 04:30 | 16:52 | - | 12:07 | 11:07 | 23:31 | 01:45 | 14:07 | 02:45 | 15:07 | 01:15 | 13:37 | 02:30 | 14:52 |
| 1. des | 02:16 | 14:41 | 01:16 | 13:41 | 01:31 | 13:56 | 04:16 | 16:41 | 05:16 | 17:41 | 00:31 | 12:56 | 11:56 | - | 02:31 | 14:56 | 03:31 | 15:56 | 02:01 | 14:26 | 03:16 | 15:41 |
| 2. des | 03:06 | 15:31 | 02:06 | 14:31 | 02:21 | 14:46 | 05:06 | 17:31 | 06:06 | 18:31 | 01:21 | 13:46 | 00:21 | 12:46 | 03:21 | 15:46 | 04:21 | 16:46 | 02:51 | 15:16 | 04:06 | 16:31 |
| 3. des | 03:57 | 16:23 | 02:57 | 15:23 | 03:12 | 15:38 | 05:57 | 18:23 | 06:57 | 19:23 | 02:12 | 14:38 | 01:12 | 13:38 | 04:12 | 16:38 | 05:12 | 17:38 | 03:42 | 16:08 | 04:57 | 17:23 |